fylgiskriv 25

FISKIMÁLARÁÐIÐ

Heilsu- og innlendismálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

**Stjórnarskrivstovan**
8. juni 2018
Mál: 18/00173-6
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: BL/KM

Tygara skriv:

**Viðmerkingar til uppskot um løgtingslóg um fyrisiting av margfeldinum í náttúruni (náttúrumargfeldislógin)**

Lógaruppskotið fevnir um nógvar tættir, sum hava við málsøkið hjá Fiskimálaráðnum at gera. Í tí sambandi hava vit viðmerkingar av yvirskipaðum slag og til einstakar greinar í lógaruppskotinum.

Viðvíkjandi landbúnaðarøkinum verður víst til viðmerkingar frá Búnaðarstovuni, ið hevur fingið lógaruppskotið til ummælis.

**Yvirskipað**
Tað er eitt framstig, at meginreglur um náttúrumargfeldi verða staðfestar í føroyskt lógarverk, og at myndugleikin hevur leiðreglur at halda seg til í lógar- og kunngerðasmíði, og tá fyrisitingaravgerðir verða tiknar, sum viðvíkja fyrisiting av margfeldinum í náttúruni.

Í lógaruppskotinum er tó lagt upp til reglur og skipanir, sum geva grund til viðmerkingar av yvirskipaðum slagi, serliga tí, at í uppskotinum eru heimildir hjá landsstýrismanninum, ið varðar av lógini, at taka avgerðir, sum nerta við málsøkið hjá øðrum landsstýrisfólki.

Dømi um hetta eru í kapitli 3 í lógaruppskotinum. Í grein 15, stk. 4 er t.d. áseting, sum undantekur ávísa veiðu, heysting og aðra gagnnýtslu, sum er fevnd av løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi. Sum vit lesa tekstin, fevnir hetta undantakið kortini ikki um aðra tøku, t.e. tøka, sum ikki hevur gagnnýtslu sum endamál. Eftir hesum kann landsstýrismaðurin, ið varðar av lógini, eftir grein 17 taka avgerðir á einum øki, sum vanliga verður roknað at hoyra undir landsstýrismannin í fiskivinnumálum.

Yvirskipað hevur hetta við málsøkjabýtið og ábyrgd landsstýrismanna at gera. Tað snýr seg um, at heimildir í umsitingini av einum málsøki eru greiðar, m.a. so at eingin ivi er um, hvør landsstýrismaður hevur myndugleika og ábyrgd á málsøkinum.

Ministry of Fisheries

Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • Fax (+298) 35 30 35 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo

Í tí sambandi er fyrst at siga, at skilnaðurin millum heysting, veiðu/heysting/gagnnýtslu og tøku, sum gongur aftur nógvastaðni í lógaruppskotinum, og sum eisini í summum førum er avgerandi fyri, hvør hevur heimild at regulera, kann ørkymla og er við til at gera lógina óneyðuga fløkta og torskilda, bæði fyri borgarar og umsiting. Yvirskipað snýr tað seg so ella so um burðardygga gagnnýtslu av náttúrutilfeinginum, og at myndugleikin regulerar, hvussu vit brúka náttúruna og meingi hennara, sama um ein kallar hetta fyri veiðu/heysting/gagnnýtslu ella tøku.

Í framhaldi av hesum halda vit, at tað hevur týdning, at heimildin at regulera alla veiðu/heysting/gagnnýtslu/tøku er hjá einum og sama landsstýrismanni. Margfeldishugsanin eigur at byggjast inn í sektorlóggávuna. Dømi um hesa hugsan er sjófeingislógin, har tað í umsitingini av lógini skulu takast atlit at meginreglum um burðardygga gagnnýtslu, herundir at tryggja lívfrøðiliga margfeldið. Hetta eigur eisini at vera galdandi fyri aðra lóggávu, sum landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum varðar av – bæði galdandi og komandi. Í galdandi lógarverki fyri t.d. veiðu eftir hvali, fugli og haru er tørvur á broytingum, so lógarverkið lýkur nútíðarkrøv. Margfeldisatlitini eiga somuleiðis at vera ein natúrligur partur av grundarlagnum undir komandi lógarsmíði, kunngerðum og fyrisitingaravgerðum á økinum.

Hóast løgtingslógin um fyrisiting av sjófeingi er nevnd í hesum høpi, bæði í lógarteksti og viðmerkingum til uppskotið um náttúrumargfeldislóg, gera vit vart við, *at tað er* generelt galdandi fyri lóggávuna, sum landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum umsitur, at hon ikki hevur sama skilna millum sløg av veiðu í mun til endamál (veiðu/gagnnýtslu/tøku), og at tøka tí væl kann vera fevnd av okkara lógarøki. Sum dømi kann nevnast ásetingin í fuglaveiðulógini um at skjóta grágæs. Her verður loyvið at skjóta grágæs grundað á eitt endamál, sum er fevnt av § 17, stk. 1, nr. 2 í uppskotinum til margfeldislógina.

Í einstøkum førum er í lógaruppskotinum lagt upp til ásetingar, sum hava við sær, at málsøkjabýtið verður broytt. Sum dømi kann nevnast § 15, stk. 1, sum hevur við sær, at veiða eftir kópi ikki kann halda fram.

**Einstakar greinar**

<u>Til § 2, stk. 2</u>
Vit mæla til at orða § 2, stk. 2 greiðari, so ivi ikki er um, hvat er landafrøðiliga gildisøkið hjá lógini. Til dømis við at byrjanin verður orðað soleiðis: "*Stk. 2.* Á føroyska landgrunninum og í føroyskum sjógvi uttan fyri føroyskt sjóumveldi galda ........."

Viðvíkjandi "landgrunninum" er neyvan ivi um, hvat hetta merkir. Eitt hugskot kundi tó verið at útgreina hugtakið í viðmerkingum, eins og tað er gjørt í t.d. serligu viðmerkingunum til grein 1 í uppskotinum til sjófeingislógina (løgtingsmál nr. 18/2017).

Hinvegin halda vit ikki, at tilvísingin til "ytru føroysku landleiðina" er nóg neyv, og mæla tí til at broyta orðingina sum omanfyri. Nevnast kann, at hugtakið varð brúkt í gomlu lógini um vinnuligan fiskiskap, har føroyska landleiðin var býtt í tvey: ytra landleiðin og innara landleiðin. Í nýggju sjófeingislógini er hvørki "landleiðin" ella uppbýtið av henni brúkt. Ístaðin verður brúkt "føroyskur sjógvur", sum er alt økið innan fyri føroyska fiskimarkið. Hugtakið "ytra føroyska landleiðin" kann eisini skjótt koma í bland við "Det ydre

territoriale farvand", sum er økið frá grundlinjunum út á 12 fj., (sí Anordning nr. 240 af 30. april 2002 om ikrafttræden for Færøerne af lov om afgrænsning af søterritoriet).

Til § 15, stk. 2
Vit mæla til, at plantur í sjónum vera undantiknar hesi áseting, og at hetta greitt framgongur av lógartekstinum í margfeldislógini. Plantur í sjónum eru fevndar av løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi.

Til § 15, stk. 4
Vit mæla til, at fiskur í áum og vøtnum verður undantikin lógini, og at § 17 tí verður nevnd í § 15, stk. 4 saman við §§ 16, 18 og 19.
Fiskur í áum og vøtnum er fevndur av løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi, og fevnir lógin eisini um "tøku", sum er fevnd av § 17 í uppskotinum um margfeldislóg.

Til § 72, nr. 1
Vit taka undir við, at landsstýrismaðurin í heilsu- og innlendismálum ger tær konsekvensbroytingar í okkara lóggávu, sum lagt er upp til.

Blíðar heilsur

Betzy Ludvig
løgfrøðingur